Viðmerking:

# Hví Caragata?



Tá aðalorðaskiftið var í løgtinginum um framtíðar vinnupolitikkin í Føroyum, luttók eingin andstøðutingmaður í orðaskiftinum, av tí at samgongutingmenn ikki kundu semjast um, hvønn politikk landsstýrið og samgongan hava á hesum øki.

Andstøðan helt tað tí ikki vera rætt, at luttaka í hesum aðalorðaskifti, sum í roynd og veru var ein samgongufundur, har langt var ímillum partarnar.

**Caragata álitið**
Grundarlagið hjá landsstýrismanninum í vinnumálum fyri einum framtíðar vinnupolitikki í Føroyum kenna vit øll. Tað var hann, sum fekk Caragata álitið skrivað, og hann hevur ongantíð dult fyri, at hann av heilum huga gongur inn fyri tí, sum hetta álit sigur.

Ørvísi er við Tjóðveldisflokkinum, hvørs framsøgumaður hevði hug til at traðka Caragata álitið undir fótum. Sjálvt tey brotini, sum landsstýrismaðurin hevði valt burturúr, fyri at tekkjast sínum samgongufelagum, vórðu ruddaði av borðinum.

Undir slíkum umstøðum, verður tað trupult hjá andstøðuni at luttaka í einum aðalorðaskifti um politikkin hjá landsstýrinum og samgonguni.

**Karráð liberalisma**
Caragata álitið má sigast at umboða ta sonevndu karráðu liberalismuna. Allar almennar ognir skulu seljast, og so at siga eingi krøv verða sett til keyparan, annað enn tað, at hann skal eiga pening at keypa fyri. Eingin sigur heldur, at keyparin skal vera føroyingur, men hann kann eins væl vera útlendingur, sum ongantíð hevur givið sær far um, at Føroyar eru á heimskortinum.

At privatiseringar kunnu vera góðar, man neyvan nakar ivi vera um. Men at privatisera, við at avreiða føroyskar ognir til útlendingar, kann ikki verða rætta leiðin at ganga. Eg dugi heldur ikki at síggja nakra meining í at privatisera, bara fyri at privatisera.

**Hvør keypir?**
Sambandsflokkurin hevur eitt uppskot liggjandi í løgtinginum, um at privatisera Føroya Banka í smáum, so síggjast kann, hvør undirtøkan er. Føroya Banki var privatur undan kreppuni, so í tí førinum kann tað væl ikki vera nakar trupulleiki.

Men støðan er ein onnur, tá Caragata álitið nevnir til dømis Atlantsflog. -Hvør keypir? Og hvar endar føroyska flogfelagið, um tað verður privatiserað?

Tað verða neyvan vanligir føroyingar, sum fara at nýta sparipeningin til at keypa eitt flogfelag fyri.

Harafturímóti er ikki óhugsandi, at nakrir vælbjargaðir føroyingar, fara at síggja møguleikan at gerast uppaftur betri fyri, við at keypa partabrøv í onkrum felag. Úrslitið verður, at gjógvin ímillum tey sum kunnu og tey sum ikki kunnu verður djúpari.

**Skattalætti**
Samgongan hevur nú lagt uppskot fyri løgtingið um at lækka partafelagskattin niður í 20 prosent. Tað sum er undrunarvert er, at øll partafeløg koma undir lækkingina. Ein hevði vónað, at tað bert var fiskivinnan sum fekk hesar sømdir, tí tað tykist at vera torført at gera nýiløgur, meðan onnur vinna gongur strúkandi.

Tær 40 miljónir kr., sum skuldu nýtast til íløgustuðul til fiskivinnuna, vóru lovaðar sum skattalætti. Men nú hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum longu tagað burturav, og tí verður helst ikki talan um nakran skattalætta.

Hann hevur sagt, at 10 miljónir kr., skulu nýtast til botnfrádráttin til pensjonistar. Alt gott um tað, men var tað ikki landstýrisins egni brølari, at lógin upprunaliga var skeiv. Tí eigur botnfrádrátturin ikki at takast av teimum 40 miljóninum kr., men beinleiðis úr landsskassanum!

Aðrar 7 miljónir kr., fara til barnafrádráttin, sigur landsstýrismaðurin. Hví skal hann tað ? Var tað ætlanin, tá Javnaðarflokkurin legði uppskot fram um at hækka barnafrádráttin upp í 18 ár?

Eg skilji ikki samanhangin í øllum vavstrinum hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Í uppskotinum um partafelagsskattin stendur, at gjaldast skulu 35 prosent í skatti, tá vinningsbýti verður útgoldið, tí tað fer at menna feløgini. Ólíka betri hevði verið at latið fólk goldið skatt á vanligan hátt av vinningsbýtinum, so høvdu partafeløgini av álvara verið styrkt.

**Hvat ætlar landsstýrið?**
Tað má sigast at vera stórt spell, nú bert eitt ár er eftir, til næstu sáttmálasamráðingar verða á arbeiðsmarknaðinum, at samgongan ikki kann koma við greiðum boðum, sum siga føroya fólki, um inntøkuskatturin fer at lækka ella ikki.

Øll minnast, hvussu støðan varð seinast, tá lønin hækkaði. Tá fekk lønmóttakarin ongan vinning av lønarhækkingini, av tí at alt gjørdist dýrari.

Samgonguskjalið lovar skattalætta, meðan landsstýrismaðurin við skattamálum sigur, at løtan til tað, ikki er tann rætta. Samstundis krevja samgongutingmenn, at landsstýrismaðurin fylgir samgonguskjalinum.

Tað má vera eitt krav frá fakfeløgunum og føroya fólki, at tey fáa at vita, hvat landsstýrið ætlar á hesum øki. Hesin spurningur má í øllum førðum verða svaraður, áðrenn næstu sáttmálasamráðingar byrja.

**Heðin Mortensen**
**løgtingsmaður**

## Sjálvstýrishugleiðingar á Grækarismessu

Tjøldur tita títt um teig,
hava strítt seg langa leið.
Ung og gomul kát seg frøa,
halda fund um vár at røða.

Døpur skýggj um fjallatindar,
bera boð um kaldar vindar.
Brátt er hvítt og kalt alt landið,
tjøldur svong og køld á sandi.

Men vónir góðar tjaldrið eigur,
væntar skjótt at byggja reiður.
Tol skal til, tað fer at linna;
sólin skal á vetri vinna.

*Absalon Absalonsen*

# Grækarismessurøðan ár 2000 á Bugnum

Góðu skótar, góða hornorkestur og gott fólk.

Teir grønu skótarnir eru grønir. Tjaldrið er hvítt, svart og appelsingult. Einki er so vist sum tað. Litirnir hava alt at siga. Hygg at teimum farvuríku føroysku bygdunum, hvussu livandi tær liggja við sævarstrond og pulka sær við fjøruklettin! Men eg má siga, at tað harmar meg, at tað eru vorðnar so nógvar svartar tekjur í bygdunum kring landið. Tað er ov tungt. Svart er svart. Tað er tann tyngsti liturin, ið til er, so eg fari at heita á tykkum, sum fara at skifta tekju í summar, ikki at skifta til svarta tekju heldur grøna ella reyða ella onkran annan lit, sum lyftir upp í landslagnum. Tá ið tjaldrið tekur land, er tað ov tryst hjá tí at skoða tær svørtu tekjurnar. Tey, sum búgva ovaliga í bygdunum mugu ásannað, at svá er.

Nú varð nomið við tann svarta litin. Tjaldrið er eisini svart. Men her er skil í. Tað er javnvág ímillum hvíta, reyða og svarta litin. Soleiðis skal tað eisini vera hjá okkum, tá ið hugsað verður um húsatekjurnar.

Vildi eisini ynskt at javnvág var í, tá ið um veður og vind galt.

Vandi er altíð í hvørjari vælferð. Vit geva teimum grønu rætt, tá ið tey vísa á, at dálkingin frá Evropa røkkur líka norður í arktisku økini. Umstøðurnar hja fólki, sum liva við hesar strendur, gerast verri og verri. Sót frá sótsvørtum verksmiðjuskorsteinum og guvuvatn frá atomdrivnum kraftverkum fer út í natúruna. Natúran er ikki so, at hon klárar at niðurbróta alt rut og rusk, ið kemur frá hesum pørtum av ídnaðinum. Tí kemur ódámur í og livikorini hjá fólki, ið býr fjart frá okkum , verða skerd av somu orsøk.

Skótin er góður við natúruna. Hann fer um dalar og skørð við telti sínum og tekur tað til sín, sum eygað sær. Summardagar liggja skótar í legum saman við feløgum aðrastaðni frá — úr Føroyum og øðrum londum við. Bond verða knýtt fyri lívið og træðrir frá hesum døgum minna á, at natúran er tað stoltasta, sum okkum er givin. Hon tilevnar teg sum menniskja - hon bjóðar tær av.

Natúran hevur mangan verið beisk, ótespilig og kravt sítt. Hon vísir okkum hvør hon er. So mangan hava vit hoyrt og sæð fjalladun, upphald á fjøllum, havið ruskut sum ývið høvur, brimið staðið í grasið og hvirlurnar farnar um fjørðin, eins og frekir, dansandi marmennlar. Tað, sum vit hava tokkað til, eru vár-, summar-, heyst- og vetrarløtur, hvar kvirran og ljósið við sínum litum hevur sett dám á. Hetta er natúrligt, men ónatúrligt verður tað, tá ið regn, stormur, kavarok og turkur verða so ógvuslig, at tað stendur um lív manga staðir. Hetta stendur bara við og versnar. Ikki at tala um skerpingin, sum hevur verið víða um á Sunnaru hálvu tey seinastu árini. Er hetta orsakað av at ójavnin í natúruni er komin av dálking og burturkasti? — Eingin ivi um tað. Nú hoyrist eisini um vatnflóð og glopraregn í Afriku, sum ongangtíð fyrr. Stynjar jørðin í sini ómegd, tí megurð er komin í?

Teir, sum balast á havinum, vita um alt hetta at siga, tá ið veður og vindur vísir sínar tenn. Hetta er okkara umstøður, at fara í bardaga ímóti natúruni, fyri at yvirliva her á klettunum. Tað vilja vit, men svárt verður tað, at bardagin verður kanska ein annar, tá ið ójavnin er komin í av órøkt, óskipaðum loysnum, atomburturkasti, sóti - ja av dálking í sjálvum sær, sum elvir til óregluligt veðurlag.

Tann fagri, grøni liturin er boðskapurin. Grønt skal tað vera. Skótin er boðberi og boðskapurin er: Farið væl um natúruna, tað er keldan til lív okkara!

Hornorkestrið, sum so trúfast blæsir fyri okkum, tá ið merkisdagar eru í bygdini, ber fram í tónleikinum í dag grønar, reinar vártónar.

1964 varð heitt á navnframa listamannin Chagall (1887-1985) um at mála hválvið í Paris oprruni. Hesum eftirlíkaði hann. Chagall brúkar bjartar litir i sínum málningum. Hválvið er eitt meistaraverk. Litirnir eru fyri tað mesta gulir og grønir og umboða kend tónaskøld. Í tí grøna litinum síggjast Hector Berlioz, franskur komponistur (1803- 69) og Richard Wagner, týskur komponistur (1813-83). Í tí gula litinum er Tjaikovskij russiskur komponistur (1840 — 93).

Tónleikurin spríkir út úr tí litfagra hválvinum.



Hesin farvuríki himmalin ber boð um eina viðkvæma sál, sum livdi fyri listini og dugdi at týða tónleikin í litum, sum kom av pallinum, fór kring rúmið, hevjaði seg upp undir hválvið og_ to sing like a bird without themes or method, segði Chagall, tá ið hválvið var liðugt. Mozart er við í rokanum við gandafloytuni. Tann svarti liturin hómast í støðum í hesum hválvi, men javnvág er í.

Tónleikur tulkar tað, sum er innast í sálarkrókunum. Fyri tað kann hann vera einkultur sum lúðraljóðið í dag ber boð um. Ja, bert eitt lítið klipp úr tí reyða nevinum er tónleikur fyri okkum. Hesi løg bera grønan gróður við sær. Gandafloytan hjá Mozart rungar undir hválvinum í Paris opruni, lúðraljóðið rungar millum fjøll í Fuglafirði og tað lítla, fitta tjaldursklippið syngur fyri okkum úr vøggu í grøv undir hesum megnar hválvi, sum er kring Fuglafjørð. Jú, grønt skal tað vera, og tað er best! — Men svartar tekjur — nei, tær hevði Chagall málað grønar til javnvág kom í.!

Vónandi verður tað so í framtíðini, at tey sum hava mátt og megi til at broyta gongdina við dálkingini, fáa góð kor at arbeiða undir og vent hesum ráki til tað betra, so javnvág verður aftur í natúruni.

Skótin er trúfastur, og takk skulu tit hava, tit grønu skótar, at tit fyriskipa hetta hald ár um ár, at taka ímóti tí trúfasta vár- og summargesti okkara, tjaldrinum, tað er tykkum til mikla tign og sóma og tøkk fái hornorkestrið, at tit trúliga ár um ár seta dám á tilveru okkara við tónleiki tykkara.

Eg ynski tykkum øllum eitt gott vár og gott summar.

**Frits Johannesen**



# Í býin Í býin Í býin - altíð eitt stað at fara


Streymoy

fk Mat-seðilin

Hósdagin 16. mars:
Bayonneskinka

Fríggjadagin 17. mars:
Entrecote

Leygardagin 18. mars:
Culottesteik

Mánadagin 20. mars:
Medistapylsa

Týsdagin 21. mars:
Fiskafrikadellir

Mikudagin 22. mars:
Bostonsteik

Kostnaður 30,- kr.

***

Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95

Matstovan í Hoyvík

Kaggin



Hóskvøldið spælir
TAXI
Fríggja- og leygarkvøldið spælir
MOONSHOT
Kaggin
Kaggin
Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

NÁTT-BUSSURIN
v/ Øssur Christiansen

Leygarkvøldið:
- Úr Vestmanna kl. 24
- Úr Tórshavn kl. 01
- Úr Vestmanna kl. 04
- Úr Tórshavn kl. 05

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)

Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu



Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

sosialurin
www.sosialurin.fo

Nor›oyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Leygarkvøldið 18/3 spælir "TAXI" til dans í Klubbanum
TAXI spælir í Lognbrá fríggjakvøldið 17/3
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT
Á SKY
Sosialurin - 311820

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

Su›uroy

HJARNAR Í VÁGI



HJARNAR
spæla til dans leygarkvøldið 18/3 í VB-húsinum
Sumbiar Ítróttarfelag
Sosialurin - 311820

CAFÉ NATÚR
* * *
Staðið har vit hittast
***

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Opið er:
Mán.– Hós. kl. 19.00 – 23.30
Fríggjadag kl. 17.00 – 03.30
Leygardag kl. 19.00 – 03.30
Sunnudag kl. 17.00 – 23.30

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO
311234

Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650


Vilja tygum vi› í

Í b‡in - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum *í b‡in*, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur